

# Oljuprísurin hevur hug at hækka í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

13.11.2015 - 11:32

Oljan.fo

Oljuprísurin tykist at kvinka uppeftir í dag, aftaná at hava lækka í fleiri dagar.

Í løtuni kostar eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent 45,89 dollarar, og tað er ein lítil hækking samanborið við tá marknaðurin lat upp í morgun. Samstundis er talan um eina munandi lækking um vit hyggja eftir gongdini síðani seinast í oktober, tá prísurin lá millum 51 og 52 dollarar fyri fatið.

Tað sama er galdandi fyri amerikansku léttoljuna WTI, sum í løtuni kostar 42,05 dollarar fyri fatið. Tá prísurin seinast í oktober var upp á tað besta, so kostaði eitt fat knappar 48 dollarar.

Hóast gongdin tykist at vera hækking í oljuprísinum í dag, so vísir eitt yvirlit frá Oslo Børs at virði á oljuni yvir tíð er nógv lækkað. Farnu tvey árini er oljuprísurin lækkaður við umleið 60 prosentum, samstundis sum sokallaði hovedindeksurin á Oslo Børs er hækkaður við 40 prosentum.


Oslo Børs Benchmark Index OSEBX [OSS] - Historical
OSEBX - Oslo Børs Benchmark Index
Period Technicals Compare Events Annotations Settings Template Cursor Share
OSEBX
2012 Nov
Apr
Jul
Oct
2014
Apr
Jul
Oct
2015
Apr
Jul
Oct